VALGREINAR

# Málsetningurin er, at øll skulu hava tað gott

**Jóanis Nielsen**
*valevni Fólkafloksins í Vágum*
*www.joanisnielsen.fo*



Allir flokkar hava sum aðalmál, at allir føroyingar skulu hava tað gott. - Tí skuldi tað verið sera lætt, at liva upp til henda málsetning. - Hjá øllum flokkum skuldi politikkurin tí klárlagt, hvussu teir klára at liva upp til málsetningin.

Men nú er tað at tvídráttur kemur í, allir vilja renna skjótari enn beinini eru før fyri.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin onga ávirkan í seks ár.

Fyrr varð javnan havt á munni: ”Tú mást ikki ferðast ov skjótt, tí annars fylgir sálin ikki við”.

Er tað ikki júst tað, sum er hent? - Um vit t.d hyggja eftir úrslitum í Vágum - hvussu Vágar eru útbygdar tey seinastu seks árini, so eru tveir tunnlar borðaðir her á landi, jú báðir eru komnir í Vágum.

Úrslitið er, at nú stendur Sambandsflokkurin, sum absolutt onga ávirkan hevur havt seinastu seks árini, til at fáa báðar mennirnar í Vágum. --- . --- Men vit vístu í verki, hvør dugur er í okkum.

Okkara fremsta mál nú er at fáa, stórsta arbeiðspláss okkara, flogvøllin útbygdan og nútímansgjørdan.

Góðu vágafólk, minnist til framburðin í oyggj okkara.

Borgan fyri framhaldandi menning í VÁGUM.

X - Fólkaflokkin

# Nýggj byrjan

**Kenneth Rasmussen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Við einum vali endar alt og byrjar alt, segði ein ávísur havnarmaður við butterfly og sigar.

Nú verður ein nýggj byrjan. Tað er alneyðugt fyri Sjálvstýrisflokkin at taka greiðar støður í teimum spurningunum, sum eru og verða á politisku dagsskránni í Føroyum. Vit kunnu ikki halda fram við at tekkjast øllum. Vit noyðast at taka eina støðu og harvið traðka onkran á tærnar.

**Fyri mentan**

Sjálvstýrisflokkurin er ikki ímóti føroyskari mentan. Vit vilja arbeiða fyri, at gomul føroysk sermentan ikki hvørvur og at skapandi list fær so góðar umstøður sum til ber.

Tað er føroyska mentanin í øllum sínum fjølbroytni, sum ger okkum til tað stolta fólk, vit eru. Vit eru sera errin av at hoyra um okkara egnu, sum røkka góðum úrslitum innan ítrótt og tónleik í øðrum londum. Hesi fólkini geva okkum ókeypis positiva umrøðu, sum annars hevði kostað okkum milliónir av krónum í marknaðarføring.

Landsins myndugleikar eiga at eggja kommunum til at betra um umstøðurnar hjá mentanini og skapa neyðugu karmarnar, tá einstaklingar og feløg taka stig til mentanarligt virksemi, sum er við til at gera ymsu økini í landinum meiri áhugaverd at búgva og støðast í.

Veljið flokkin við skilagóðu loysnunum. Veljið Sjálvstýrisflokkin.

# Suðringar veljið framtíðina!

**Jóhanna í Ólavsstovu**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Suðuroy*



Minnast tykur støðuna uppundir valið í 98'? minnast tykor at landi líktist mest av øllum einum fallitbúgvið. Alt trongdið til ábotur, okur skyldaðu 6.3 milliardir í uttanlandsskuld, og hagfrøðingarnir sótu og hugnaðu sær við at roknað út, hvussu nógv hvør nýføðingur skyldaði tá hann var føddur.

Men Tjóðveldisflokkurin trúði uppá at tað skuldi kunna bera til at fáa landið aftur á føtur.

Sambært øllum hinum flokkunum var einasta loysnin at fáa meira pengar úr Danmark, at fáa donsku vaskikonuna at betala fyri okra yvirforbrúk - hvar er skommin?

Tjóðveldisflokkuri hevur prógvað at tað ber til til at sleppa danska skjúrtuvelinum og sjálvur seta seg á kassa.

Síðani 98' hava okur niðurgoldið uttanlandsskuldina við eini knappari helvt, samstundis sum blokkurin, er minkað við 1/3.

Sambandsflokkarnir hava í øldur, trútta niður í okum at okur kunna ikki klárað okum uttan blokkin. Í dag, nú Tjóðveldisflokkurin hevur víst teimum at tað ber til, eru teir allir samdur um at hann má ikki hækkast.

Blokkurin er í dag góðar 600 mió. kr. eru tykur klár yvir hvat hettar svara til í tygra pengapungi - 40 kr. um dagin !

Samstundis sum man hevur goldið niður uppá skuld so eru eisini íløgur gjørdar fyri 800 mió. og suðuroyggjin hevur fingið sín stóra part av hesum íløgunum.

Men hóast tað so er langt á mál, um okur so leggja alla oynna undir í betong so kann tað alt gera tað sama um fólkið sum er her onki hevur at gera, og um okur ikki kunna skap teimum ungu møguleikar fyri at búleikast her.

Okur her suðuri standa fyri øllum teimum daprastu hagtølunum, størsta arbeiðsloysinum, lægstu lønirnar osf. Hettar er ein gongd sum okur muga fáa vent.

Fiskivinnan er okra primervinna og sjálvandi skal hon eisini hava tær bestu umstøðurnar at arbeiða undir, men samstundis er tað alneyðugt at oyggjin eisini fær nøkur stabil arbeiðspláss, sum ikki lata seg ávirkað av lágum fiskaprísum, ringum fiskaríði, hørðum streymi, verkføllum osf.

Og hesur møguleikarnir liggja í okkum sjálvum !

Okur skullu ikki billa okum inn at naka kemur at bjóða okum nakað upp í hendurnar, okur muga krevja, men samstundus muga okur eisini duga at vísa á teir møguleikar, sum liggja her.

Er tað kanska nøkur náttúrulóg at allir almennir stovnar skulu liggja í Havn? - nei tað er tað ikki !

Hvat er tað til dømis, ið talar fyri, at Hagstovan liggur í Havn? - onki !

Og hví skal høvuðsskrivstovan hjá Strandferðsluni liggja í Havn, um nøkur fá ár er Smyril einasta strandferðsluskip í landinum, tað er væl heilt náttúrligt at umsitingin av stovninum liggur í Suðuroynni.

Um eini 2-3 ár er Sjúkrasystraskúlin húsvillur og okur vita øll at hvørt kustaskáp í havnini er fult Hví skuldi sjúkrasystraskúlin ikki kunna ligið her.

Við nýggja Miðnámsskúlanum lata okur upp møguleikarnar fyri at Suðuroyggin framyvir verður KT depilin í Føroyum.

Hendan vinnan er tann sum er í størstum vøktri í øllum heiminum, og ímeðan sita okur og hyggja at. Við at menna KT - undirvísingina og skapa eitt KT - umhvørvið í oynni kunna okur gerast partur av hesum útviklinginum.

Sum fiskivinnutjóð er tað ein stór skomm, at okur í Føroyum ikki hava eitt sjóvinnusavn. Og hví skuldi hettar ikki ligið í Suðuroynni. Við nýggja Smyrli er ein upplagdur møguleiki fyri at tað framyvir verður ein sjálvfylgja hjá ferðafólki, at tey koma higar at vitja sjóvinnusavnið.

Í áravís hevur íslendska fyritøkan DeCode strídst fyri at sleppa framat gransking í Føroyum. Fyritøkan hevði trý tey fyrstu kvartalini í fjør eina inntøku uppá 207 mió. kr. Hví skulu okur ikki vinna pening og førleika her sjálvi?

Og fyri at fáa hettar gjøgnumført muga okur syrgja fyri at velja okum politikkarar, sum tora at bróta næsar fyri sakina.

Sum hugsað meira enn um sín egna búk, og sum tora at seta sessin uppá spæl fyri sakina.

Tá tykur fara á val, hugsið so um, hvat hesur harrarnir hava gjørt fyri oynna ?

Hugsa um, hvussu ofta tú hevur verið skuffað, tú ger tína skyldu, fer á val, setur krossin har tú heldur tað verða rættast, og áðrenn tú hevur vent tær á gólvinum er títt valevni flutt til Havnar.

So til tykum øll, lat tað verða hesuferð at tú fer á val og velur eitt valevnið, sum meinar tað í álvara, sum ikki bara utnyttar tykkra stemmur fyri at bjarga sínum egnað búkið, men sum fer at tora at strídast fyri sakini.

Vel framtíðina -vel Tjóðveldið !

# Undangongumonnum og -kvinnum eiga vit at stuðla

**Jaspur Vang**
*valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Teimum, sum hava hugskot, hegni, dirvi og áræði til - sjálvi ella saman við øðrum - at skapa inntøkuskapandi virksemi, eiga vit at stuðla.

**Hvørji eru tey.**

Talan er um kvinnur og menn um alt landið, sum við jøvnum millumbilum fara undir virksemi, sum tey meta vera inntøkuskapandi. Tað krevur hegni, dirvi og áræði at fara undir slíkt virksemi, sum harumframt er ógvuliga orku- og tíðarkrevjandi.

Virksemið, talan kann verða um, er t.d. tilvirking av fiski og fiskaúrdráttum, nýskapan innan eitt nú ullvøruframleiðslu, virksemi innan kunningartøkni og framleiðslu av útbúnaði til eitt nú fiski- og alivinnuna.

**Krevjandi íverksetan..**

Hesir íverksetarar hava sett sær fyri at menna og tilvirka eina vøru ella tænastu, sum síðani eitt nú skal marknaðarførast, seljast og útflytast til onnur øki ella lond. Harumframt er talan um tíðarkrevjandi umsitingarligt arbeiði í samband við eitt nú rakstur, bókhald, marknaðarføring og sølu. Eisini krevst stór fíggjarorka at stovna og reka slíkt virksemi.

Tí er vandi fyri, at góð hugskot, - vørur ella - tænastur, vera av ongum, um ikki íverksetararnir hava nóg góðar karmar at virka innan.

**Hvat gera vit.**

Sambandsflokkurin vil arbeiða fyri, at sonevndu vinnuframalógirnar við tilhoyrandi kunngerðum verða settar í verk eisini í Føroyum. Eydnast hettar arbeiðið, kann talan verða um at veita íverksetarum

- serkøna hjálp og ráðgeving í samband við stovnan og rakstur av egnum virki,
- trygd fyri parti av íløgunum í virkið og
- gjald fyri part av lønarútreiðslunum eitt ávíst tíðarskeið.

Harumframt fer Sambandsflokkurin at arbeiða fyri, at fyritøkum kann verða veitt útflutningstrygd, eins og skattauppskot Sambandsfloksins, har m.a. seinast vunna króna verður skattað lægri enn undir núverandi skipan, uttan iva fer at vera inntøkuskapandi virksemi til frama, eins og tað fer at økja um hugin til at skapa og bróta upp úr nýggjum.

Ein fortreyt fyri, at hesi átøk kunnu gerast veruleiki er tó sjálvsagt, at landsbúskaparliga støðan - og landsfíggjarligu útlitini eru til tað.

Fyri Sambandsflokkin hevur tað nevniliga nógv størri samfelagsligan týdning at stuðla undangongumonnum og undangongukvinnum og harvið menna føroyska samfelagið, heldur enn at fremja yvirtøkur og harvið økja almennu fyrisitingina og umsitingarnar enn meira.

Vilt tú vinnulívinum og vælferðini væl - vel Sambandsflokkin.



VALGREINAR

# Tryggar karmar um vinnuna og betri kor fyri handverkslærlingar

**Haldur Vang**
*valevni Fólkafloksins í Eysturoynni*



“Vit skapa ikki framgongd við at straffa spararan, vit styrkja ikki tann veika við at svekka tann sterka, og vit hjálpa ikki lønmóttakaranum við at eyðræna arbeiðsgevaran.”

**Góðu føroyingar.**

Nú skulu vit aftur velja umboð inn á Føroya Løgting, umboð, sum skulu mynda okkara dagligdag í framtíðini. Tí er tað ikki líkamikið hvør verður valdur inn á løgting, sum summi halda.

Orsøkin til, at eg havi játta at vera eitt av valevnum Fólkafloksisn til Løgtingsvalið 20. januar er, at eg altíð havi sett eina æru í, at vera sjálvbjargin, og ikki at liggja øðrum til byrðu, fólkaflokksins politikkur er sjálvbjargni, har sum vit valda skulu vit eisini gjalda.

Fólkaflokkurin setir familjuna, trivnaðin og kristna siðaarvin í hásæti, og vil framhaldandi virka fyri, at tað verður gott hjá øllum borgarum, at liva á hesum so stórliga vælsignaðu oyggjum.

Fólkaflokkurin vil virka fyri at vit fáa einar fríar og frælsar Føroyar, við góðum samarbeiði við grannar okkara, og heimin annars.

Fólkaflokkurin vil geva vinnuni tryggar karmar at virka undir, tí uttan eitt sterkt og tryggt vinnulív, hava vit heldur onga vælferð.

Aðalhugsjónin er, at vinnan eigur at klára seg sjálv uttan almennan stuðul, vit eiga tó ikki, at vera bangin fyri, at veita vinnuni eina hjálpandi hond, tá ósjálvgjørd hóttaføll koma á útflutningsvinnuna og vandi er fyri, at vinnutólini, fyskirættindi og marknaðir gleppa okkum av hondum, men vit skulu eisini tora, at avtaka hjálpina, so skjótt sum vinnan er komin úr kreppuni aftur.

Amerikanski statsmaðurin Abraham Lincoln, segði,

*“Vit skapa ikki framgongd við at straffa spararan.” “vit styrkja ikki tann veika við at svekka tann sterka” og “vit hjálpa ikki lønmóttakaranum við at eyðræna arbeiðsgevaran”*

Tað eru flokkar í ikki undir nøkrum umstøðum, vilja hjálpa vinnuni. Eg haldi, at vit ikki bara kunnu sita hendur í favn, meðan bestu skipini vera seld av landinum, og tí haldi eg, at so standa vit áðrenn vit vita av eftir, við ongum ella bara gomlum og niðurslitnum vinnutólum, tá ið kreppan er av.

Uppskot var fyri stuttum frammi, um at lække endurgjaldið úr 75, niðurí 50 %, sum lærupláss í dag fáa fyri skúlagongd hjá lærlingum.

Hettar er eftir mínum tykki tann skeivi vegurin at fara, nú í útlitini fyri framman kanska ikki eru tey bestu.

Ungdómar sum velja eina handverks útbúgving, eru troyttir av at ganga í skúla, og tí er tað skeivt at tvinga hesi fólk aftur í skúla í heilar 20 vikur, hettar eigur at vera broytt.

Ein lærlingur skal í dag hava 28.500.- krónur. Í løn í skúlatíðini, fyrsta árið.

Eitt virki, sum tekur 4 lærlingar inn í senn, skal sostætt gjalda 114.000.- krónur í lønum meðan lærlingarnir eru í skúla, bara fyrsta árið.

Um stuðulin fellur burtur, vera færri handverkslærlingar tiknir inn, sum so í staðin fara í onkra bókliga læru, har skulu teir so hava studning, og helst væl meira enn handsverkslærlingurin fær.

Landskassin kemur sostatt bara at missa meira fyri minni, um stuðulin til læruplássini verður lækkaður, eg vil tí mæla til, ikki at lække stuðulin, men heldur at hække hann aftur til 100 %.

Vit eiga ein sera góðan og virknan ungdóm.

Sum sjálvandi tekur undir við Fólkaflokkinum, og vil standa á egnum beinum, í einum frælsum landi.

Tí fara vit øll, bæði ung og gomul á val og velja Fólkaflokkin, lista A, ella eitt av valevnum Fólkafloksins.

# Jarðarlóggávan

**Sámal Petur í Grund**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Sjálvstýrisflokkurin hevur meldað klárt út, at hann í komandi valskeiði ynskir at gera nakað við jarðarlóggávuna.

Eisini er sett upp, hvat hesi ynski ganga út uppá. Høvuðsmálið er at skapa trivnað bæði hjá áhugabólkum og vinnubrúkarum.

Í valskrá okkara stendur at verandi traðir og smá festi skulu gerast ogn. Harumframt hevur flokkurin sett sær fyri, at matrikkulskipanin skal broytast so at lættari verður at skipa tey smærru brúkini.

Í dag er nærum eingin trivnaður innan landbúnaðin. Hetta skyldast tey ognarviðurskifti sum eru galdandi.

Møguleikarnir eru nógvir. Vit skulu vera sjálvbjargin við teim urdráttum sum landbúnaðurin kann veita. Vit skulu lata áhugabrúkararnar hava møguleika fyri at fríðka og betra um jarðarteigarnar við vissu um, at átaki kemur teimum sjálvum ella eftirkomarum til góðar.

Vit eiga nokk av lendi til bæði vinnurekandi bóndur og ognarmenn. Eisini er nokk av lendi til teirra sum bert ynskja ein lítlan jarðarteig afturat húsarhaldinum.

Alt sum ger okkum meira sjálvberandi og samstundis kann økja trivnaðin eigur at vera gjørt fyri okkum øllum at gagni.

X við lista D.

# Tillukku Eivør Pálsdóttir, við virðislønunum, ið tú verður heiðrað við

**Jónfinn Olsen**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Tað er sera gott at vit av Guds tíðni náði eiga evnaríkar tónleikarar í millum okkum. Og sum nú eisini fáa ikki minni enn 2 víðislønir fyri avrik sítt.

Eivør hjartaliga tillukku við víðrislønunum tú hevur vunni tær í Íslandi. Vóni sanniliga at tær skal ganga ast gott í framtíðini.

Hetta gevur okkum í Føroyum nakað at hugsa um Føroyum at frama, hetta at skapa karmar fyri okkara evnaríka fólk, innan millum annað tónleikararnar so góðar sum yvir høvur møguligar her heima á landi, so at tónleikararnir kunna menna seg, soleiðis at teir ella tey kunna fara út í stóru verð at takað avbjóðingar upp og møguliga vinna sær hetta sum lívsstarv sítt.

Men størsti týdningurin er at myndugleikarnir her heima gera karmarnar fyri millum annað tónleikararnar her í Føroyum so góðar sum møguligt, nú einaferð er. Og tað eru karmarnir her heima sum skula gerast so góðir sum møguligt, so kann tónaleikarin sjálvur arbeiða sæg víðari fram undir hesum góðu fortreytum, til at menna seg á ymiskan hátt, eisini uttanlanda, møguliga saman við plátufeløgum ella managara sínum, hetta má standa upp til tónleikaran sjálvan.

Eivør, øllum víðhaldsfólki tínum, øllum tónleikarum og Føroya fólkið, eg ynski tykkum Harrans ríku signing í framtíð tykkara

Øll eru vit við til at menna hetta land, eisini tónleikararnir. Lat MIÐFLOKKIN sleppa at verða við til at gera karmarnar so hetta gerst møguligt og nógv betur enn í dag.

# Skálafjørðurin framtíðar vinnumiðdepil Føroya

**Dánial Petur Hansen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Vit hava eitt væl virkandi vinnulív her á fjørðinum, í Havn hava teir fingið sær eitt stásiligt vinnuhús. Tað náttúrliga er at øki her verður útbygt sum kraftcentrið hjá føroyska vinnulívinum.

Soleiðis skal m.a. miðast fram ímóti, at útbúgvingar- og granskingarmøguleikar verða styrktir her á staðnum. Altjóða stevnur, konferansur, fyrilestrar og skeið innan vinnulívið skal hava sín heimstað á Skálafjørðinum.

Tænastu- og ráðgevandi fyritøkur innan vinnulívið, skulu í nógv størri mun enn higartil velja at leggja seg her á økinum.

Skálafjørðurin skal styrkjast sum náttúrligur framtíðar vinnumiðdepil Føroya.

Ein nýggj og virkin byrjan við Sjálvstýrisflokkinum er tann gongda leiðin. Gott val!

# Val í ótíð

**Sunniva Kollslíð**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Norðurstreymoy*



Eitt løgtingsval í ótíð órógvar arbeiði hjá tí almenna óneyðugt, mál - sum eru næstan liðugt viðgjørd fella burtur, og fleiri av hesum málum eru sera týdningarmikil, og tey eru nú útsett í óavmarkaða tíð.

Her hugsi eg serliga um lógaruppskotið um nýggja barnaverndarlóg og so øll hini málini, sum eru fyrireikaði og klár at fremja, um vit halda fast um sjálvstýristilgongdina og ábyrgdarleiðina.

Nógv av tí vanliga arbeiðnum kann ikki gerast, frá tí at val er útskrivað, og til nýtt landsstýrið er skipa, og hetta kostar samfelagnum hópin av peningi.

Vit áttu at havt eina skipan sum segði, at allir møguleikar skuldu verið roynder fyri samgongu, áðrenn loyvt var at útskriva val í ótíð, hesa ábyrgd skuldu okkara politikkarar kent, heldur enn at útskriva val av persónligum ávum.

Føroya løgmaður vildi ikki, ella hevði hann ikki dirvi til at lata møguleikan til aðrar flokkar at skipa eina nýggja samgongu, og hetta haldi eg verða tekin um, at hugsað verður meiri um egnan vinning, heldur enn hvat er best fyri samfelagið.

At løgmaður hevur útskrivað val í ótíð, uttan at hava roynt aðrar møguleikar, er ikki at vísa ábyrgd, álit og árræði, sum Fólkaflokkurin annars lýsir við á flestu av valmyndunum, men heldur um tað øvugta.